Í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein

# Robbie umhugsar stjørnulívið



Bretski poppsangarin Robbie Willams umhugsar nú, um hann skal leggja stjørnulívið og konsertferð til viks og heldur fara at hugna sær heima og verið meira anonymur. Robbie Williams sigur í sínum bloggi, at longri hann er burtur frá almenninginum, betur dámar honum tað. Í øllum førum skal tað verða greitt, at Robbie ikki fer á nakra størri konsertferð næstu tíðina.

# Potts koppaði Larsen



Danir eru kløkkir av, at walisiski sangarin Paul Potts hevur koppað tí so sigursvanda Kim Larsen av tónleikatrúnuni í Danmark. Kim Larsen plagar at selja flestu fløgurnar í Danmark, men í 2007 koppaði Paul Potts Larsen av listanum. Potts seldi 116.000 eintøk av síni fyrstu útgávu, One Chance, meðan Kim Larsen megnaði at selja 107.000 eintøk av sínari seinastu útgávu. Britney Spears kláraði seg hinvegin serstakliga illa á danska marknaðinum. Hennara seinasta útgáva seldi bert 15.000 eintøk.

*Mynd: Polfoto*

# Bond-babe úr Ukraina



Í næstum byrja upptøkurnar til tann 22. Filmin um bretska agentin James Bond. Og sum vanligt skal Bond eisini í samband við vakrar kvinnur, og tað plagar at verða hørð kapping um at gerast Bond-babe. Nú er greitt, hvørjar tvær av kvinnunum í filminum verða. Onnur er bretska Gemma Atherton, og ukrainska modellin Olga Kurylenko skal hava ein týðandi leiklut í filminum. Hon hevur júst verið at sæð í filminum Hitman.

# Potter-brillur á savn



Daniel Radcliffer er kendur um allan heimin í leiklutinum sum Harry Potter, og nú hevur undir bretski sjónleikarin latið einar av sínum brillum til eitt Holucaust-savn. Har verður ein serlig framsýning tan n27. Januar, og ein partur av framsýningunum er eitt fjall av brillum, sum skal ímynda tað, sum veruliga hendi í týningarleguni Auschwitz undir seinna heimsbardaga. Onnur, sum hava latið brillur til savnið, eru Yoko Ono, Jerry Springer og Stephen Fry.

# Supermodell sum forsetafrúa



Franski forsetin Nicolas Sarkozy fór herfyri frá konuni, og síðani er tað komið fram, at hann er blivin væl við fyrrverandi supermodellina Carla Bruni, sum nú roynir seg sum tónleikara. Tey eru blivin so væl, at franski forsetin nú hevur váttað, at tey fara at giftast. Sambært fronskum miðlum skal forsetin hava fríggjað til Bruni á jólaferiuni í Egyptalandi.